# Keypa russiskar toskakvotur

Íslendsk reiðaríir hava keypt kvotur frá russum sum svara til 3.200 tons av toski. Hetta er ein avleiðing av skerjingini í íslendsku toskaveiðini upp á tilsamans 63.000 tons. 3.200 tons muna ikki nógv, tá ið niðurskurðurin er so stórur, men eisini hesi tonsini gera mun. Tað er Fishupdate.com, sum ber hesi tíðindi. Prísirnir á toski hava leingi verið góðir á marknaðinum, og teir eru framhaldandi á veg uppeftir. Íslendingar halda, at keyptu veiðirættindini eru lønandi, hóast prísirnir á kvotunum eru høgir. (-vilmund)



# Eystursjógvur gerst súrari

Dálking ger meira og meira um seg í Eystursjónum. Tað staðfesta mátingar, sum gjørdar eru gjøgnum fleiri áratíggjur. Tey, sum standa fyri hesum mátingum, siga, at ph-innihaldið í Eystursjónum minkar, samstundis sum havøkið gerst súrari. Mett verður, at hetta í fyrsta lagi fer at ganga útyvir føðina hjá fiskinum, sum so aftur verður verri fyri. (-vilmund)



# Verjir móti sukursjúku

**Tað loysir seg at eta fisk, um tú ætlar at minka um vandan fyri at fáa sukursjúku**

Ein amerikonsk kanning vísir, at børn við typu 1-diabetes, sum er arvalig, minka um vandan fyri at fáa sukursjúku við 55%, um tey eta omega 3-feittsevjur.

Tilsamans 1.779 amerikonsk børn í vandabólkinum vóru við í kanningini, og nógv færri av teimum, sum hava etið tran, fingu sjúkuna enn tey, ið ikki ótu tran.

Nýggjar kanningar vísa eisini, at olja úr kópi er góð í viðgerðini móti bruna í tarmunum.

Hetta kom fram á eini ráðstevnu í Vasa í Finlandi herfyri.

Aftur her eru tað omega 3-feittsevjan, sum ger undurverkið, siga granskarar. (-vilmund)

Kanning millum útisetar:

# Føroyskir menn tje

**Í nærum øllum bólkum, sum fáa fyribils veitingar og í øllum bólkum, sum fáa varandi veitingar, er talið av konufólki størri enn talið av mannfólki. Hetta er eisini galdandi við fólkapensjónini, har væl fleiri føroysk konufólk enn mannfólk eru fólkapensjónistar í Danmark**

FØROYSKIR ÚTISETAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Norðuratlantsbólkurin, sum á tíðindafundi fríggjamorgunin hevði framløgu av ymiskum taltilfar um føroyskar útisetar í Danmark, hevði nógv ymisk – og áhugaverd – viðurskifti at vísa á. Taltilfarið er í fyrsta lagi sambært hagtølum hjá Danmarks Statestik.

Samlaða talið av føroyskum útisetum í Danmark, býtt yvir trý ættarlið, er 22.549, sum er út við helmingurin av samlaða fólkatalinum í Føroyum. Av hesum eru tey 9.741 født í Føroyum.

Tað var Leivur Persson, sum hevði framløguna vegna Norðuratlantsbólkin, og tað eru Leivur, Gunnar Bjarnason og Annika Smith, sum hava staðið fyri kanningini og hava lagt bóklingin, sum givin er út, til rættis.

### Menn tjena meira

Undir framløguni segði Leivur, at galdandi fyri allar aldursbólkar av føroyskum útisetum í Danmark er, at bruttoinntøkan hjá mannfólki er væl hægri enn miðalinntøkan hjá konufólki í sama ættarliði og aldursbólki.

- Hetta er sama mynstur, sum sæst aftur aðrastaðni í vesturheiminum, segði hann og legði aftrat, at fyri øll ættarlið er eisini galdandi, at munurin á miðallønini millum kynini er lítil í byrjanini, men hann gerst størri, tess eldri fólk gerast.

Hann vísti á, at í fyrsta ættarliði er miðal bruttoinntøkan hjá einum føroyskum manni í Danmark (25-39 ár) stívliga 215.000 krónur, meðan ein føroysk kvinna í sama aldri tjenar smáar 180.000 krónur.

Í øðrum ættarliði tjenar maðurin góðar 280.000 krónur og kvinnan góðar 212.000 krónur.



# Met hóast minkandi nøgdir

Í fjør útfluttu danskir fiskaútflytarar fyri tilsamans 19,4 miljardir krónur í fiskavørum, men í ár vænta teir, at útflutningurin verður størri

Hóast minni fiskur kemur upp á land í donskum havnum, setir fiskaútflutningur kortini met - aftur í ár.

Samlaði fiskaútflutningurin í fjør var 19,4 miljardir krónur, men í ár vænta útflytarar at seta nýtt met.

Nøgdin í landingunum eru minkaðar tað mesta av einum triðingi, men prísirnir fyri útfluttu vørurnar eru nógv øktir - so nógv, at danskur fiskaútflutningur annað árið á rað fer at seta met í virði. (-vilmund)




*Landaðu nøgdirnar í donskum havnum eru minkaðar við sløkum triðingi*

# Selja smolt til Ruslands

Flutningurin av smoltinum úr Skotlandi til Ruslands tók sjey samdøgur

Eitt skotsk alifelag seldi herfyri 300.000 laksasmolt til Ruslands.

Sum skilst, er hetta fyrstu ferð, at skotar hava selt russum smolt.

Laksasmoltið úr Skotlandi gongur nú á Ambarnaya-fjørðinum, nær Murmansk.

Tað tók sjey samdøgur at flyta smoltið upp til Ruslands. (-vilmund)

